eftir við allari hesari eykavektini...

## 20. juli

Eg má havt verið rættiliga naiv, tá ið eg í gjár helt, at trupulleikarnir hjá okkum vóru lidnir eftir motor-trupulleikarnir. Ætlanin var, at túrurin suður bert skuldi taka tíggju tímar – men endin varð, at vit sótu sveittandi í bussinum í meira enn 21 tímar. Eftir at vit allan dagin høvdu steðgað eitt ótal av ferðum fyri at sjaførurin kundi roykja, fólk kundu fara út at pissa o.s.fr., vórðu vit aftur kl. 23 noydd at halda ein langan steðg. Vit vóru tá ein tíma frá at røkka okkara máli, men nú var einki bensin eftir! Vit vórðu tí noydd at bíða í einum býi í tríggjar tímar fyri at onkur kundi koma við bensini til okkum… Segði nakar "african time"? Allar pausurnar bilaðu nú ikki so nógv, tí tað var hugnaligt at vera millum hini í bussinum og útsýnið gjøgnum bussvindeyguni var fantastiskt. Tað er veruliga nakað heilt serligt at fáa møguleika fyri at koyra gjøgnum Afrika – landslagið er avbera vakurt og fólkini, man koyrir framvið, eru blíð, smílast glað til ein og vinka.

## 21. juli

Nú hava vit longu verið í Afrika í fleiri dagar – tað er rættiliga løgið at hugsa sær.

Vit eru endiliga komin fram til verkætlanarøkið hjá okkum nú (nýggju skúlarnar, sum OD-hjálpin m.a. eisini fer til, kunnu vit ikki vitja av trygdaráðum og vit fara tí at vitja skúlarnar, sum vórðu bygdir í 2003 í jólakalendaraverkætlanini og sum OD fer at hjálpa til við at halda við líka). Niger er 4. fátækasta landið í heiminum og hetta kemur nú týðiliga til sjóndar í m.a. íbúðarviðurskiftunum hjá teimum lokalu úti á landinum, har vit nú eru. Vit sova á madrassum undir einum hálvtaki við moyggjabitanetum yvir okkum. Hesi net eru hent at hava við sær, tí malariamoyggjabitarnir eru um seg frá sólin fer niður til hon er komin upp aftur. WC-viðurskiftini eru eisini munandi øðrvísi enn heima; okkara WC er eitt hol í gólvinum í einum ótespiligum rúmi, har kakkerlakar stórtrívast. Her er sjálvandi ei heldur nakað bað, so man noyðist bert at brúka ein vátan klút til vaska sær.

Komandi seks dagarnar er ætlanin, at vit í trimum bólkum skulu vitja tríggjar ymiskar bygdir fyri har at læra mentanina og fólki betur at kenna. Hetta skal so í síðsta enda gera okkum betur rustaði til at fara runt á skúlanar kring Danmark og Føroyar at greiða frá um Niger. Saman við fýra av hinum frá OD skal eg tískil komandi dagarnar vera í bygdini Kaima, har fólkasløgini hausair og fulaniar búgva síðu um síðu.

Saman við einum øðrum bólki, fóru vit til okkara egnu bygd og bygdina Bajega, har tað bert búgva hausair. Tað var løgið at síggja, hvussu stórur munur var á bygdunum. Í Bajega sat høvdingurin á einum skinni og sá hábærsligur út, tá hann "gav okkum loyvi at vitja bygd hansara". Ein fjøld, ið útstrálaði stóra gleði, kom ímóti okkum har. Tey klappaðu og flentu, hvørja ferð vit opnaðu munnin, óansæð hvat vit søgdu. Í Kaima var dámurin heilt øðrvísi og nógv meira avslappaður. Har vórðu ikki so nógv fólk savnaði, tá ið vit komu, tí tey flestu framvegis vóru í markini og arbeiddu. Høvdingurin var eisini munandi meira avslappaður; hann kom friðarliga yvir til okkum og setti seg har eftir eina løtu.

## 22. juli

Marknaðardagur, aftur-aftur.

Hvønn týsdag er stórur marknaður her í Gabi og seljarir koma úr øllum teimum smáu bygdunum har í nánd fyri at vísa vørur teirra fram og vónandi eisini fáa okkurt selt nakrar av teimum. Serliga nú her í regntíðini hava bóndirnir nógv at gera við arbeiði og vit vilja ikki órógva arbeiði teirra meira enn hægst neyðugt – ein mistur arbeiðsdagur herniðri kann nevniliga elva til, at eingin matur er til familjuna eitt longri tíðarskeið. Hesin marknaðurin var eitt sindur øðrvísi enn marknaðirnir í stórbýunum, tí tey her eisini selja ymiskt frá landbúnaðinum – sum t.d. djór. Eg spurdi ein av tulkum okkara um prísin á eini geit, ið var til sølu og fekk at vita, at hon kostaði 18.000 CFA (t.e. 180 kr). So lítið skal altso í veruleikanum til fyri at hjálpa einari familju herniðri – upphæddin noyðist ikki at vera størri enn so, at man gevur 180 kr.! Og hvat brúkar vit í Føroyum vanliga 180 kr. til? Kanska til ein góðan máltíð á einari matstovu? Eitt par av Björn Borg undirklæðum? Ein túr gjøgnum Norðoyatunnilin?

Hóast officiella trúgvin í Niger er islam – er hendan trúgvin her øðrvísi enn okkara vanliga fatan av islam, sum her er blandað við upprunatrúnna, sum var í Niger, áðrenn islam kom. Á marknaðinum fingu dreingirnir frá sekreteriatinum tosað við ein lokalan medisinmann, sum m.a. segði frá, at eitt tindasvínahøvd er mest kraftfulla amulettin, sum er til – hon verjir nevniliga ímóti at konufólk verða ótrúgv... Hvør segði, at vesturlendsk læknavísind er betri?






